# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*23. oktober fingu Katrin Dam og Sonny Johansen Sandavágur/Miðvágur, búsitandi í Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 3830 gr og var 51 cm langur*



***Hey tit øll!***
*Endiliga kom mín fitta lítlasystir heim til okkara :) Hon er fødd í Sudurkorea 22. marts. Hon er soo fitt!! Vit fýra búgva í Sandavági. Alt tað besta*
***Áki Oliver***

12. oktober fingu Alice og Óli Mortensen, Tórshavn, tvíburðar, gentur. Onnur var 47 cm long og vigaði 1800 gr. Hin var 51 cm long og vigaði 2320 gr.

4. oktober fingu Marjun Danielsen og Jógvan Petersen, Kvívík, búsitandi í Keypmannahavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2950 gr.

20. oktober fingu Joan Heinesen og Terji Sørensen, Tórshavn, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2975 gr.

22. oktober fingu Diana Gram Lydersen og Rúni Mohr, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3500 gr.

24. oktober fingu Ebba Sofía Kruse og Jens Kristian Schilling, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 3900 gr.

25. oktober fingu Elisabeth og Eiler Hansen, Leirvík, ein son. Hann var 44 cm langur og vigaði 1950 gr.

26. oktober fingu Katrine Klein Arnbjerg og Jógvan Páll Simonsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3440 gr.

26. oktober fingu Sylvia Berthelsen-Petersen og Kristvar Nilssen, Leirvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4300 gr.

26. oktober fingu Rúna M. Olsen Davidsen og Tony L. Davidsen, Sandavágur, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3700 gr.

28. oktober fingu Elsebeth og Jørgin Jacobsen, Leirvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3965 gr.

29. oktober fingu Siri Vidtfeldt Rasmussen og Hallur Poulsen, Tórshavn, eina dóttur. Hann var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

29. oktober fingu Eydna Ljósheim og Johnleiv Thomsen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4150 gr.

# Óli Johansen 60 ár

Leygardagin 7. november fyllir Óli Johansen, Tvøroyri, vanliga nevndur Suðringurin, 60 ár.

Góði abbun. Nú tú verður 60 ár 7. november, ynskja vit at tú fær ein góðan dag.

Vit elska at koma heim til tín at ferðast. Tí hvør dagur er so spennandi: Út at sigla við bátinum hjá tær og at seta og draga kalvalínu, sigla við flaka, fiska úti á kaini, finna krabba, ganga í fjøllunum, ja nógvar túrar hava vit havt við tær, og tá vit funnu upp á at senda fløskupost frá Bukkevald og fingu svar uppá hann aftur úr Noreg. Tað eru longu nógv ár síðan. Vit hava brævsamband enn við Noreg og senda jólapakkar til hvønn annan.

Góði abbun, vit ynskja tær ein góðan dag.

**Heilsan Michelle og Mathias**



# Heilsan til Óla Johansen

Góði pappa

Okur børn vilja hervið senda tær eina føðingardagsheilsan, nú tú verður 60 ár 7. november.

Tú var ungur, akkurát blivin 14 ár, tá ið tú fórt til sjós, so til Íslands at arbeiða í Ólavsvík. Komin heim til Tvøroyri, fór tú út at fiska og forvinna tær pening. Tú keypti tær bát sjálvur og gekk tað gott hjá tær, inntil tú søkti á skiparaskúla á Fanø. Vit búðu í Esbjerg tey árini, tú sigldi sum fiskiskipari. Fluttu so til Tvøroyrar, har tú sigldi sum skipari, til tú vildi royna okkurt annað. Tað bleiv so til kaifúta.

Í fríløtunum fekst tú við kalvalínu, har vóru okur børn sett til at egna kalvalínu og hjálptu til, har vit kundu.



Eldborg, báturin, og tú eru komnir við nógvum kalva, og bleiv tað tín leið at keypa og selja til Svøríki. Har afturat stendur tú nú á Vaglinum og selur øll sløg av fiski, og hevur tú gjørt tað í nógv ár. Har onkur børn hava nógv góð minnir frá, tá ið vit hava staðið og selt við tær. Jú, hava okur spurt um hjálp, hava vit øll í sínum lagi fingið tað vit hava spurt um.

Okur ynskja tær ein góðan dag.

Tak er kun et fattigt ord, men takk alíkavæl.

**Ynskja Miriam, Benjamin, Majken og Rebekka**

# MERKISDAGAR

**70 ára føðingardagur**
Sunnudagin 1. nov. verður Elsa Egilsnes, Vestmanna, 70 ár. Dagurin verður hildin á Fjørukrønni frá kl. 16. Øll eru vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Mánadagin 2. nov. verður Maria Magnussen við Eirikstoftir í Miðvági 80 ár. Opið hús er heima hjá Mariu og Jóhan mánadagin frá kl. 14 og úteftir, og eru øll hjartaliga vælkomin at heilsa uppá Mariu.

**80 ára føðingardagur**
Mikudagin 4. nov. verður Arna Dalbø Hansen, Svínáir, 80 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 7. nov. frá kl. 12 til kl. 15.

**80 ára føðingardagur**
Hósdagin 5. nov. verður Sámal Christiansen, vanliga nevndur Sámal hjá Barbu, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin í Skálanum leygardagin 7. nov. Opið hús er frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 2. nov. hava Óluva og Jónfríður Nielsen, Saltangará, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

**Silvurbrúdleyp**
30. nov. hava hjúnini Alberta og Eirikur Magnussen, Tórshavn, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 28. nov. í HB-Húsinum kl. 19. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 216324 (Alberta) ella 214456 (Eirikur) innan 14. nov.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 1. nov. hava Kristina og Hans Andrias Jacobsen (Stina og Dia av Syðradali), gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin 7. nov. í Bøgøtu 3, Klaksvík. Vælkomst verður frá kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Kristinu og Hans Andrias, kunnu siga frá á tel. 456737 ella 458625.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 8. nov. kunnu hjúnini Herborg og Hildibjart Johansen, Tórshavn, halda gullbrúdleyp. Tey ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið, eru vælkomin til eina hugnaliga løtu í Starvsmannafelagshúsinum J.H. Schrøtersgøta 9 frá kl. 12 til 17.

**Gullbrúdleyp**
28. nov. hava hjúnini Tóra og Ólavur Nolsøe Olsen, Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík leygardagin 5. des. kl. 18. Tey ið vilja halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 444159 - 737751 ella toraolavur@gmail.com áðrenn 20. nov.